# Vit mugu standa saman

**Vit prenta í dag røðuna, sum William Smith helt á Vestanstevnu í ár**





**Gott kvøld Sørvingar!**

Góðu stevnugestir!

Ja, so var tíð aftur hjá Sørvágs bygd at verða vertur fyri Vestanstevnuni, og eru vit komin saman her í kvøld at avvikla eina av siðunum á slíkari stevnu, nevniliga midnáttarrøðuna. Higartil hevur stevnan verið góð, lagið er gott á fólki og veðrið, ið vanliga er ein tann mest avgerðandi faktorurin, hevur skikkað sær væl.

Skal fyri mítt viðkomandi siga, at eg føli meg ikki sørt erpnan av, at Sørvágur í ár hevur heitt á ein av sínum tilflytarum um at taka sær av hesum tátti. Takk fyri tað!

Hetta verður eitt spennandi vikuskifti fyri bygdina og okkum, ið her búgva, gestirnar eisini og ikki minst tey ungu, ið hava glett seg so sera nógv til hetta heilt serliga vikuskiftið í juli.

Ein lítil áheitan til tykkum ungu: Vælsignaði farið væl um tykkum sjálvi!

Stevnan er so sera lokal, tað sæst aftur á teimun aktivitetum og broytingum, ið hava verið her hesar síðstu vikurnar. Her hevur verið nokk at ríva í og hevur hvør óviti um so er at hann er farin um markið og er blivin 15, havt úr at gera.

Tað er sum um bygdin er vaknað úr einum dvala og ein nýggjur andi er blástur innyvir hana!

Ein starvsfelagi koyrdi framvið í gjár og helt, at Sørvágur luktaði allur sum hann er av grønsápu!

Somuleiðis boðaði ein deiligur deymur av asfalti í gjár frá, at nú er Mýruvegurin klárur til nýtslu, so stevnan er góð, eingin ivi um tað!

Alt hettar er komið uppí lag við einum felags taki, har stevnufyrireikarar, saman við kommununi, eiga tað dýrasta takið, ímeðan vit harheima hava tikið tað strævnasta takið, plenur skulu sláast, og gamlar syndir plettast, tað skal vaskast og tað, ið ikki fór á nýggjársbálið, má beinast burtur, so stevnan er ikki bara bara!

Serliga æruvert er tiltakið, sum kommunan hevur sett í verk og hevur stuðlað, hetta at seta ung í arbeiði.

Hervið geva tit ungdóminum ein smakk av, hvat teimum er í væntu herúti, eftir skúlan, og at eitt gott arbeiði gevur eitt gott lív. Teir flestu grundarsteinarnir er givnir okkum, sum foreldur og skúlanum at leggja, og nú við at kommunan eisini leggur nakrar, kann bert betra um úrslitið.

Hetta er eitt langt tørn og koma vit at brúka tað mesta av okkara tíð í vinnu, sjálvsagt, ikki øllum er hettar unt.

Tað eru so nógvir faktorar, sum kunnu snýkja seg inn í líkningina og harvið broyta úrslitið. Allar hesar faktorar kenna vit, vit síggja teir, hoyra um teir, føla teir og líva saman við teimum og harvið verða vit øll rakt av teimum so ella so, serliga, tá ið vit búgva saman í lítlari bygd.

Tíðin upp undir sjálva stevnuna hevur eisini verið merkt av, at nógv umtala - serliga í fjølmiðlunum - hevur verið frammi rundanum um Oynna, og serliga bygdina.

Natúrøkini, ið av Guds hond eru givin okkum, eru til fría nýtslu, so her er bara at taka til sín, um ein hevur hug til tess og krydda við einum ótali av tilboðum frá lokalum, ið hava nýtt henda møguleikan at gera tað til sín vinnuveg eisini, gera tað totala upplivilsi stórt!

Bátatúrar út í Hólm, til Mykinesar ella suðurum at vitja holurnar, gongutúrar í fjøllunum, kvøldtúrar, hestaríðing, tilboðini eru nógv. Haldi sjálvur at Lakeside hjá Òlavi Poulsen er prikkurin yvur iiið.

Ólavsøka á Oyrum og sandholið, eru vælvardir dýrgripir her vesturi, jú, vit, ið her búgva, eru rík!

Kappróðurin, ið ikki er lív lagað her vesturi, hevur verið tosað nógv um, sjálvsagt, ein døpur søga, men hinvegin, var sjálvur partur av manningin á Bliki í 1984, tá ið vit fingu ein bát til láns frá sørvingum. Báturin kundi ikki brúkast, tí hann var so skeivur, vóru boðini. Vit vunnu Ólavsøkuróðurin tað árið, teir, ið tóku við árið eftir gjørdust Føroyameistarar, so Sørvágur hevur hóast alt verið við til sólskinssøguna á Argjum, so haldið tit bara við Argjabátinum, so følist tað gott!

Fasta sambandið hevur verið tikið uppá tungu, eitt evni, ið hevur órógvað undirritaða sera nógv,

Um hugsað verður um, hvat ávirkan 65 millónir ár av isolatión frá meginøkinum hava havt á oynna, og hvat ávirkan hetta fór at hava, nú oyggin gjørdist ein partur av meginøkinum.

Tann 10. decembur 2001 gjørdist „tað“ sambandið veruleiki, at skilja ella ikki, so gjørdist kompromiðið, sum við so nógvun øðrum í einum sokallaðum demokratii, at ein bummur varð settur upp og er hann sum eitt dustkorn í eyganum hjá onkrum av okkum, men spennandi verður at síggja tað veruliga virðið í hesi verkætlan, tá ið hon opnar um eini 5-7 ár, og tað gerst frítt at ferðast undir Sundinum - tá fara fleiri við okkum at frøðast um hetta megnar verk, og oyggin - saman við landium - fer at fáa fulla nýttu av hesi verkætlan.

Tað hevur verið tosað um at fáa fleiri bein at standa á, og er tað sera umráðandi hjá tykkum, ið ráða fyri borgum, at tit gerast tilvitandi um allar teir møguleikar, ið finnast soleiðis, at tær røttu avgerðinar verða tiknar fyri, at nýggir inntøkuvegir fáa góðan gróðrarbotn frá tykkum.

Vit hava sum er gott vinnufólk her, góðar snikkarar, góðar handverkarar, eina smiðju, ið ikki sær út av nógvum, men sum leverar. Ein timburhandil, eina fiskivinnu, ið er um at fáa fótafestið aftur, og ikki at gloyma: Vit hava skjótasta, besta og villasta timburmann!

Hetta kann alt sýnast eitt sindur ørkymlandi í hesum døgum, nú alt skal umsetast við partabrøvum, har klædningar, slips og markant brillustell seta dagsskránna, og har 42-tumma flatskermar sýna fram ekkoloddsmyndir, ið verða teknaðar av ricther-skala-grafum, ið beinleiðis avspegla smáar skjálvtar í heimsbúskapinum, har ein maðkur í eini eplaveltu í Brasilia kann fáa grafin at dýkka.

Hettar eru vinnuvegir, ið tíanverri ikki krevja uppbrotnar armar og sveittabrot, sum vit vanliga kenna sætt arbeiði, men ístaðin nakrar sera spekulativar heilar, sum duga at spáa um gongdina á grafinum.

Tað verður spennandi at síggja ella rættari sagt at hoyra, hvussu nýggjar disiplinir fara at roynast, tá ið tær í næstum skulu setast í verk her, serliga í sambandi við privateriseringina av okkara altjóða flogfelag, tí nú skulu vit og fyri Sørvág so gott sum øll bygdin, praktisera tagnarskyldu í sambandi við „insider vitan“.

Hvussu hettar kemur at rigga í praksis verður sjón fyri søgn, tí eitt er heilt víst, og tað er, at enn er eingin ljósleiðari tøkur, ið kann bera boðini so skjótt, sum tá tú ert komin á gátt hjá PE!

Tá ið frasur verður nýttar sum t.d hendan „vit mugu fáa kapping á økið“, so kann hetta vera beinleiðis tokutala.

Ein søga frá 60-unum sigur frá einum mynt-vaskarii, sum varð sett á stovn í Havn.

Hetta var slóðbrótandi fyri býin og frøddist borgarin um tað, men sum við revagarðunum á sinni, so vórðu tvey onnur myntvaskarí sett á stovn í somu gøtu, sama ár í Havn, við tí úrsliti, at við ársenda var einki vaskarí eftir!

Vit rista so øll á høvdinum, men so ikki meira enn tað. Vit kunnu velja at kalla hetta „ein veikleika í mentan okkara“. Vit hava her í Sørvági, um ikki tað størsta, so nógv tað besta arbeiðsplássið í landinum. So mikið stórt er tað vorðið, at nú er tað minni parturin av arbeiðsfólkunum, ið drynjar, og sum Jack vildi sagt: „Tað er bara so.“

Hetta arbeiðsplássið hevur staðið seg væl í kappingini við stórar altjóða fyritøkur, og er í dag ein stabilur aktørur á altjóða flogvinnupallinum. At arbeiðsplássið er kappingarført er eingin ivi um eisini, tá ið kappingin kemur frá støðum, har tú allarminst væntar tað .....

Boðskapurin er, at ístaðin fyri at dyrka aldargamla sundurlyndið í okkum føroyingum, mugu vit standa saman og styrkja okkum á teimum økjum, har vit við tógvið stríð eru vorðin sterk, og ikki blindast av smálutum sum onga ávirkan hava á ta stóru myndina.

Tí á tí stóru myndini sæst, at kapping er nakað, ið gongur fyri seg uttanfyri landoddarnar.

Um vit, sum eru so sera smá í heimshøpi, skulu gera okkum nakrar vónir um at at hóra undan, má hesin hugburður fremjast.

Fari at enda hesa røðu við einum sitati frá einum írskum vinmanni, ið starvast í París. Hann hevði møguleikan at vitja bygdina ein novembur mánaða í nógvum kava og vindi.

Eftir 5 daga steðg, tá ið vit vóru ávegis til flogvøllin aftur, læt í honum:

„ I would like to stay here for another week, I do not want to go back to Paris.“

Hetta sigur alt um okkara bygd, okkara oyggj, og okkara land!

Eg fari at ynskja tykkum eina framhaldandi góða stevnu, og til tykkum ungu - sjálvsagt er hetta tíð til gaman, men álvari er í øllum lívsins lutum, so ansið væl eftir tykkum sjálvum, og kennið ábyrgd fyri tykkara gerðum.

Takk fyri!